# LØGTINGSHÚSIÐ



## MYNDIR, FRÁGREIÐING OG TILMÆLI UM FASADU

Hanus Olsen
Verkfrøðingur



Rivur í bakplátu



Rivur í bakplátu



Rot í timbri, soppur í isolering



Væta í timbri



Tæring í stáli og væta í timbri



Tæring í stáli og rot í timbri




Tæring í stáli og rivur í betongi



Tæring í stáli, rot í timbri og soppur í isolering



Eksentriskt festi, soppur í isolering og rot í timbri




Rot í timbri og soppur í isolering



Eksentriskt festi og væta í timbri



Eksentrisk festir og tæring í stáli



Eksentriskt festi og tæring í stáli



Eksentrisk festir og tæring í stáli



Riva í betongveggi og festi av berandi stáli til betongvegg



Festi av berandi stáli til betongvegg




Svørt stálpláta boltað á betongvegg. Festi av berandi stáli til betongvegg




Festi av berandi stáli til betongvegg. Svørt stálpláta boltað á betongvegg



Stødd á RHS profili. Tæring í stáli



Stál í timburkonstruktión við tekju




Festi av stáli í timburkonstruktión við tekju. Rivur í betongveggi




Rivur í betongveggi og væta í timbri



Rivur í betongveggi og væta í timbri



Rivur í betongveggi



Svart stálfesti yvir vindeyga. Tæring í stáli



Svart stálfesti yvir vindeyga. Tæring í stáli. Eksentriskt festi



Svart stálfesti yvir vindeyga. Tæring í stáli. Eksentriskt festi



Svart stálfesti yvir vindeyga. Tæring í stáli.




Svart stálfesti yvir vindeyga. Tæring í stáli. Eksentrisk festir




Eksentrisk festir



Eksentriskt festi



Tæring í berandi stáli. Rot í timbri og rivur í bakplátu



Festi av berandi stáli í timburkonstruktión. Rivur í bakplátu



Eksentriskt festi. Rot í timbri



Skrúvur til festing av klimaskermi



Skrúvur til festing av klimaskermi




Ánæmi á lodrættum RHS profili er 1,5 cm. á fótbeslag



Fótbeslag og loddrættur RHS-profilur

# Frágreiðing og tilmæli um fasaduna á Tinghúsinum

Fyri at gera nærri kanningar av fasaduni á Tinghúsinum, vórðu plátur tiknar niður á eystur- og vestursíðuni tann 21. november 2023. Tikið er niður, so kanningar kunnu gerast av festum til glasafasadu og betongvegg.

Upprunaliga prosjektið til bering av glasfasadu er U-profilur, ið er boltaður inn á betongveggin við ásveisaðum oyrum. Hetta er seinni broytt til RHS-profil (60 x 100 mm) eftir ynski frá arbeiðstakaranum. RHS-profilarnir eru leysir frá betongveggi og javnir við innaru síðu av klimaskermi.

Avstandur millum festi av loddrættum RHS-profilum er upp til 2 m.

Festi til glas við vindeygabond eru vatnrættir RHS-profilar, sum eru festir í teir loddrættu RHS-profilarnar og ikki inn í betongveggin.

Loddrætt last frá glasfasadu skal upptakast í fótbeslag, sum RHS-profilurin skal hvíla á. Ánæmið er 1,5 cm og ikki 6 cm. Mynd á síðu 20 vísir hetta.

Til klimaskerm eru nýttar Conchip-plátur. Klimaskermurin er ótættur við nógvum rivum, tað er upp til 1,5 cm. glopp millum pláturnar.

Conchip-pláturnar (klimaskermur) eru festar í lodrætta timburkonstruktión og RHS-profilar, sum bera glasfasadu. Upp til 80 cm. eru millum skrúvur til festi av plátunum til klimaskerm.

Væta kemur inn í konstruktiónina millum klimaskerm og betongvegg. Rot og soppur er í bjálving og í timburkonstruktiónini millum klimaskerm og betongvegg.

Gjóstur og væta sleppa inn millum vindeygu og betongvegg. Hetta er tí, at tað ikki er tett um vindeygu við fuku og bjálving.

Sjónligar rivur eru í betongveggjum. Óvist er, hvussu umfatandi hetta er, tá bert ein lítil partur av konstruktiónini er tikin niður.

Við vindeygabond eru U-profilar boltaðir á betongvegg (myndir á síðu 14 og 15). Profilarnir eru óviðgjørdir og illa tærdir.

Umfatandi myndatilfar er, sum lýsir støðuna í konstruktiónunum.

**Niðurstøða:**

Upprunaliga loysnin við at bolta U-profilarnar inn á betongveggin er betur loysn enn tann valda við RHS-profilum, sum eru leysir av betongvegginum.

Tað eru fleiri samanfallandi orsøkir til, at glasplátur detta av fasaduni. Millum teirra eru eksentrisk last á beringar, ov langt millum festi av RHS-profili, og at partvíst ov veik besløg eru nýtt. Hetta hevur við sær deformatiónir í fasadukonstruktiónini, so glaspláturnar brotna um festini og detta av fasaduni.

Arbeiðið er ikki gjørt sum tekning K(25)S15 frá ráðgeva vísir. Festir til glas eru eksentrisk staðsett á loddrættar RHS-profilar. Við vindeygabond eru vatnrættir RHS-profilar festir í teir loddrættu RHS-profilarnar til bering av glasi. Í báðum førum gevur hetta eksentrika last á loddrættar RHS-profilar.

Óviðgjørt, galvaniserað, el-galvaniserað og rustfrítt stál er brúkt sum berandi stál. Hetta hevur við sær tæring av stálkonstruktiónunum.

Skrúvur eru rustfríðar, el-galvaniseraðar, galvaniseraðar og messing.

Í prosjekttilfarinum átti at verið nágreinað gjøllari, hvat tilfar skuldi brúkast.

Einki skjalatilfar er um verkætlanina so sum prosjekterings- og byggifundir, góðskutrygging og eftirlitsnotatir.

Eftirlit hevur ikki verið við arbeiðinum. Prosjektið er tillagað eftir ynski frá arbeiðstakaranum, og hóast tað, er arbeiðið ikki gjørt, so sum tillagingin vísir.

Ein verkætlan sum hendan eigur at hava avtalugrundarlag partanna millum (herundir byggiharra, arbeiðstakara og ráðgeva), har prosjekteringsfundir, byggifundir, góðskutrygging og eftirlitsnotatir fyri arbeiði er til taks, so hvørt sum arbeiðið verður gjørt.

**Tilmæli:**

Mælt verður til at taka alla fasaduna niður inn til betongvegg.

Verðandi betongkonstruktión eigur at verða kannað nærri fyri rivur og styrkt um neyðugt.

Høvðus- og detailprojekt eigur at verða gjørt, sum lýsir berandi konstruktión og uppbygnað av klimaskermi. Prosjektilfarið eigur at verða góðskutryggað fyri feilir og óhepnar loysnir. Væl av tilfari eigur at nágreinast, so tilfar, ið hevur korrektión við sær, ikki kemur í samband við hvørt annað.

Verandi konstruktiónstilfar stál, timbur og bjálving kann í lítlan mun endurnýtast orsakað av tæring, rot og soppi.

Um verandi glasfasada verður endurnýtt, verður mælt til at undurstyðja hana við fótbeslagi.

Arbeiðið skal góðskutryggast og skjalprógvast við frágreiðing og myndum, sum lýsa hvat og hvussu arbeiðið er gjørt. Arbeiðstakarin skal góðskutryggja egið arbeiði, har skjølini skulu vera til taks á byggiplássinum. Eftirlitið eigur at fylgja neyvt við, at góðskutryggingin er nøktandi.

Neyvt eftirlit eigur at vera við arbeiðinum, har eftirlitsfrágreiðingar dagliga verða gjørdar saman við myndum, sum skjalprógva gjørda arbeiðið.

Byggileiðslan skal saman við arbeiðstakaranum halda byggifundir hvørja viku. Frásøgn frá fundum skal skrivast hvørja viku av byggileiðsluni og sendast luttakarunum.

Um arbeiðið ikki er gjørt sambært prosjekti og avtalu við byggileiðslu, skal arbeiðstakarin rætta hetta beinanvegin í samráð við byggileiðslu og eftirlit. Allar átalur og rættingar av arbeiðinum skulu síggjast í byggifundarfrásagnum.

Henda frágreiðing er gjørd út frá míni bestu sannføring.

Lat meg frætta um spurningar og viðmerkingar eru.

Hoyvík 6. desember 2023

Kanningin er gjørd av:

Sp/f S. H. Ráðgeving

Oman Hoydalar 27

188 Hoyvík



Hanus Olsen